Roknskaparhefti

# Meirvirðisgjald

Virkið skal goyma roknskaparheftið og fylgiskjøl í 5 ár aftaná umrødda roknskaparár er endað, og tilfarið skal vera tøkt hjá TAKS.

**Vanligar reglur**

Øll virki, ið eru skrásett sambært mvg-lógini, skulu føra roknskap yvir keyp og sølu av vørum/tænastum, fyri at virki kunnu gera upp tað meirvirðisgjald, sum skal rindast TAKS. Roknskapurin skal samstundis geva TAKS møguleika at kanna, um meirvirðisgjaldið verður rætt uppkravt og inngoldið.

Roknskapur við meirvirðisgjaldi kann verða førdur í vanliga handilsroknskapin hjá virkinum, um hann lýkur krøvini í mvg-lógini, ella í hetta roknskaparheftið, sum fæst frá TAKS.

Fylgiskjøl til roknskaparheftið skulu goymast í somu nummarrøð, sum tey verða bókað. Førir virkið við síðuna av roknskaparheftinum annan roknskap, kann arkivering sambært hesum roknskapi eisini verða góðkend, tá ið skjølini og bókingarnar í roknskaparheftinum beinleiðis kunnu samanberast. Í roknskaparheftinum eru teigar, har virkið kann tilskila skjalanummar.

Virkið skal goyma roknskaparheftið og fylgiskjølini í 5 ár aftaná at umrødda roknskaparár er endað, og tað (heftið + skjøl) skal vera tøkt hjá TAKS.

**Kassaroknskapur**

Virkið skal føra kassaroknskap (kassakladdu), um tað sambært bókhaldslógini hevur bókhaldsskyldu, ella um roknskaparskylda sambært skattalógini er áløgd virkinum. Kassaroknskapurin skal í mest møguligan mun vísa allar dagligar inn- og útgjaldingar. Bókhaldið kann førast fyri hvønn einstakan post ella við samanløgdum upphæddum, ið eru grundaðar á sundurliðingar, har hvør einstøk upphædd er viðmerkt.

Sundurliðingarnar skulu vera kassastrimlar, paragonseðlar, serstakt bókaðir listar ella tílíkt, ið upplýsir hvørja einstaka upphædd. Kassin skal gerast upp dagliga. Um støðd og slag av virki forða fyri dagligari uppgerð, kann tó gerast upp, tá kontantar inn- og útgjaldingar hava verið.

**Keyp**

Í roknskapinum yvir keyp og keyps-mvg skulu dagligar upphæddir bókast. Tað eru upphæddir, ið eru gjørdar upp annaðhvørt grundað á eina kladdu, ella við at skjølini fyri hvønn dag verða savnað og teljistrimmil ella samsvarandi samanteljing verður heft við, soleiðis at greiðast kann frá, hvussu komið er fram til dagligu upphæddirnar. Keypir virkið bert av og á, kann hvør einstøk upphædd tó verða bókað beinleiðis í heftið.

Móttekur virkið kreditnotur frá innlendskum latarum fyri returvørur ella prísavsláttur fyri áður keyptar vørur ella mvg-skyldugar tænastur, skulu upphæddirnar á hesum skjølum vera drignar frá, áðrenn samlaða keypið verður bókað í heftið. Kreditnotur kunnu bókast fyri seg í heftinum. Tá skulu upphæddirnar merkjast við einum (–) ella skrivast við reyðum.

Virkið hevur rætt til at draga frá mvg á vørum og tænastum, sum tað hevur keypt til nýtslu í virkinum. Hetta er bæði galdandi fyri vørur og tænastur, ið eru keyptar her á landi, og fyri innfluttar vørur. Virkið kann draga

frá mvg, í tí avgjaldstíðarskeiði, tá fakturin er dagfestur. Fyri innfluttar vørur verður mvg drigið frá í tí avgjaldstíðarskeiði, tá tolling er farin fram.

Keypir virkið vørur/tænastur, ið ikki burturav viðvíkja mvg-skyldigum virksemi hjá virkinum, er bert lutfalsligur frádráttarrættur fyri keyps-mvg. Nærri reglur, herímillum reglur um roknskaparførslu í hesum førum, standa í mvg-leiðbeiningini.

Hevur virkið lagt bókførslu sína soleiðis til rættis, at keypsfakturar ikki verða bókaðir fyri enn goldið verður fyri lating, skal mvg roknast við í keyps-mvg í tí avgjaldstíðarskeiði, tá goldið verður. Velur virkið henda framferðarhátt, hevur tað rætt at javna keyps-mvg, soleiðis at tað kemur at svara til keyp av vørum/tænastum, sum eru faktureraðar av lataranum í avgjaldstíðarskeiðinum. Virkið skal javna grundað á eina sundurliðaða uppseting av skuld til latarar við byrjan og enda á avgjaldstíðarskeiðinum.

Í *teigi 1* verður bókað alt keyp av vøru til víðari sølu og keyp av kostnaðarvørum. Í teigi 3 verður bókað alt keyp, sum er at rokna sum íløga. Keypið kann bókast soleiðis at skilliga sæst, hvat er keyps prísur og hvat er mvg, ella veljast kann at bóka alt keypið, íroknað mvg, og síðani draga 20,0% og bóka tað sum keyps-mvg.

Í *teigunum 2 og 4* verður so meirvirðisgjaldið av ávikavist keypum av vørum, kostnaðarvørum og av íløgum bókað.

Virkið skal kunna skjalprógv mvg, ið er drigið frá sum keyps-mvg. Hetta kann gerast við faktura ella avrokningarskjali. Fyri vørur, sum virkið hevur innflutt, verður tollrokningin frá TAKS nýtt sum skjalprógv.

Fakturar og avrokningarskjøl skulu upplýsa:

a) dagfesting

b) navn og bústað seljarans

c) navn og bústað keyparans

d) slag, nøgd (vavi) og prís á vøruni ella tænastuni

e) støddina á mvg upphæddini ella upplýsing um, at mvg er 20,0% av samlaðu upphæddini.

Fakturar upp á í mesta lagi 200 kr. frá smásølu kunnu nýtast sum skjalprógv, hóast teir ikki innihalda upplýsing um navn og bústað keyparans.

**Fakturar og avrokningarskjøl, ið ikki lúka hesi krøv, kunnu ikki nýtast sum skjalprógv fyri keyps-mvg.**

**Søla**
Virkið skal gera upp mvg-skylduga sølu fyri hvørt avgjaldstíðarskeið. Bókhaldið í einum avgjaldinstíðarskeiði skal fevna um sølu av vørum/tænastum og úttøku til eginnýtslu hjá handhava ella til starvsfólk, umboðan v.m. í tíðarskeiðinum.

Í *teigi 5* verður samlaða sølan til innlandið førd, men uttan mvg, og í *teigi 6* verður mvg-upphæddin førd. Søla verður annaðhvørt gjørd upp grundað á fakturaavrit og avrokningarskjal ella grundað á inngingnan

pening (kassaroknskapin). Fakturaavrit og avrokningarskjøl verða førd í kladdu ella samlað fyri hvønn dag og teljistrimmil ella tílík samanteljing verður heft við, so greiðast kann frá, hvussu komið er fram til dagligu upphæddirnar.

Virki, ið bert selja av og á, kunnu tó bóka hvønn einstakan post beinleiðis í heftið.

**REGLUR**

**Roknskaparførsla í heftinum**

**Kontantsøla**
Verða vørur/tænastur goldnar, tá ið latið verður, kann mvg-skylduga sølan gerast upp beinleiðis grundað á inngingnan pening sambært kassaroknskapinum.

Tað er ikki altíð møguligt at nýta kassatól ella at føra listar v.m. yvir hvørja einstaka inngjalding. Tí má mvg-skylduga sølan gerast upp grundað á dagligar kassauppgerðir, sum skulu útjavnast fyri serligar inn- og útgjaldingar hvønn dag. Harafturat skal dagliga greiðast frá inngjaldingum, sum verða móttiknar frá kundum fyri undanfarna kreditsølu.

**Kassauppgerðin kann gerast soleiðis:**

| | |
|---|---|
| Kassapeningur á kvøldi: | 331 kr. 50 oyru |
| - kassapeningur á morgni: | <u>210 kr. 00 oyru</u> |
| = | 121 kr. 50 oyru |
| + útgjaldingar (vørukeyp, útreiðslur, innsett í peningastovn, peningur tikin til eginnýtslu): | <u>1.335 kr. 00 oyru</u> |
| = | 1.456 kr. 50 oyru |
| - Inngjaldingar, ið eru søluni óviðkomandi, t.d. tikið úr peningastovni: | <u>500 kr. 00 oyru</u> |
| = Dagsins søla | 956 kr. 50 oyru |

Áðrenn søla verður førd í roknskaparheftið, kunnu upphæddir, sum virkið hevur góðskrivað kundunum fyri returvørur v.m., dragast frá. Hetta er tó bert galdandi, tá ið mvg áður er roknað av hesum upphæddum. Kreditnotur kunnu bókast fyri seg í heftið. Upphæddirnar skulu tá merkjast við (–) ella skrivast við reyðum. Ynskir virkið tað, kann samlaði søluprísurin íroknaður mvg førast í *teigi 5* og mvg kann sambært hesum roknast við endan á avgjaldstíðarskeiðinum við 20,00% av samlaðu søluni og viðmerkjast í *teigi 6* (sølu-mvg).

Í teigi 7 verður søla, ið mvg ikki skal roknast av (útflutningur v.m.) førd. Sostatt fevnir teigur 7 um samlaða søluvirðið av øllum teimum vørum og tænastum, sum við heimild í § 2, stk. 3 í lógini skulu seljast uttan meirvirðisgjald, og á teimum vørum og tænastum, sum við heimild í § 12 í lógini skulu seljast við einum avgjaldi, sum er sett til 0%.

Virkið kann bíða við at bóka sínar fakturar og avrokningarskjøl, til kundin rindar. Í sovorðnum førum skal útjavnast fyri sølu, sum ikki er goldin, tá ið søla í avgjaldstíðarskeiðinum verður gjørd upp. Verður sølan gjørd upp grundað á inngingnan pening (kassa roknskapin), *skal* eisini útjavnast fyri møguliga kreditsølu. Harumframt skal útjavnast fyri inngjalding viðvíkjandi undanfarnari kreditsølu.

Útjavning verður gjørd við endan á avgjaldstíðarskeiðinum við at gera upp útistandandi krøv við byrjan og enda á tíðarskeiðinum. Sølu-mvg av útistandandi krøvum við byrjan á tíðarskeiðinum skal dragast frá endaupphæddini í *teigi 6,* meðan sølu-mvg av útistandandi krøvum við endan á avgjaldstíðarskeiðinum verður lagt afturat í sama teigi.

Smásølur o.o., ið vikuliga avrokna við kundar, skulu tó ikki javna út fyri hesa kreditsølu.

**Uppgerð av mvg**
Við endan á hvørjum avgjaldstíðarskeiði skulu teigarnir fyri keyp og sølu í roknskaparheftinum teljast saman. Er mvg av ávísum keypi av vørum og tænastum, t.d. telefon, ravmagn og brennievni v.m., fult út roknað við sum keyps-mvg í roknskapinum, skal møguligur privatur partur dragast frá í *teigi 2* (keyps-mvg) við endan á avgjaldstíðarskeiðinum.

Eginnýtsla o.a. skal førast inn í søluroknskapin við neyðugum teksti og mvg viðmerkjast í mvg-teigin.

**Mvg-uppgerðin**
Mvg-uppgerðin kann latast inn til TAKS á Vinnuglugganum ella við oyðiblaði, sum finst á heimasíðuni taks.fo. Oyðublaðið fæst eisini við at venda sær til kundatænastuna hjá TAKS.

*Innihaldið í mvg-uppgerðini*
Tær upphæddir, ið skulu førast í mvg-uppgerðina hjá virkinum, eru:

*Sølu-mvg (teigur 1)* fevnir um mvg av allari sølu av vørum og tænastum, undantikið tær vørur og tænastur, sum eru undantiknar meirvirðisgjaldi sambært § 2, stk. 3 í lógini, og tær vørur og tænastur, har avgjaldið sambært § 12 í lógini er sett til 0%.

*Keyps-mvg, rakstur (teigur 2)* fevnir um mvg av øllum keypi av mvg-skyldugum vørum og tænastum, tó undantikið vørur og tænastur smb. § 16, stk. 3 í lógini.

*Keyps-mvg, íløgur (teigur 3)* fevnir um alt tað, ið virkið bókar sum ogn í sínum roknskapi, ella sum:

a. maskinur, innbúgv og onnur rakstrargøgn, hvørs keypsprísur, ikki íroknaður meirvirðisgjald, fer upp um 20.000 kr., og sum eru undir virðisminkan.

b. útveganar-, sølu- ella projekteringsútreiðslur í samband við fasta ogn, skip ella flogfør.

c. uppí- og umbygging ella nútímansgerð og umvæling og viðlíkahald á fasta ogn við einum samlaðum avgjaldsskyldugum virði, sum er meira enn 50.000 kr. um árið, skipum ella flogførum.

Tað, sum ikki eru íløgur eftir hesi skilmarking, verður roknað við í teigi 2.

Mvg-frí søla (teigur 9) fevnir um samlaða søluvirðið av øllum teimum vørum og tænastum, sum við heimild í § 2, stk. 3 í lógini skulu seljast uttan meirvirðisgjald, og á teimum vørum og tænastum, sum við heimild í § 12 í lógini skulu seljast við einum avgjaldi, sum er sett til 0%.

*Oljuavgjald (teigur 6):* Her skulu virki, ið reka garðyrki og plantuskúlar (herundir vakstrarhús), fiskaaling, ídnað, gistingarhús, vallaraheim ella farmaflutningsvirki kunna søkja um at fáa brennioljuavgjaldið endurrindað. Tey virki, ið hava fingið hetta játtað, draga oljuavgjaldið frá, áðrenn mvg-upphæddin verður goldin.

Uppgerðin skal vera dagfest og undirskrivað av ábyrgdahavandi leiðslu á virkinum.

Er inngangandi mvg (keyps-mvg) í einum avgjaldstíðarskeiði størri enn útgangandi mvg (sølu-mvg), skal hetta merkjast í uppgerðini við at seta eitt týðuligt (-) framman fyri uppgivna avgjaldið. Upphæddin verður tá útgoldin av TAKS.

Uppgerðin skal, útfylt og undirskrivað, sendast TAKS seinast 1 mánað og 10 dagar aftaná, at avgjaldstíðarskeiðið er endað. Uppgerðin skal sendast inn, hóast einki avgjald skal rindast.

Er tørvur á fleiri upplýsingum ber til at ringja til TAKS á tel. 352600.

# MVG-ROKNSKAPUR

## Keyp

| Dagf. | Fylgiskjal nr. | 1 Keypsprísur, rakstur<br>☐ írokn. mvg<br>☐ frárokn. mvg | 2 **Keyps-mvg, rakstur** (inngangandi mvg) | 3 Keypsprísur, íløgur<br>☐ írokn. mvg<br>☐ frárokn. mvg | 4 **Keyps-mvg, íløgur** (inngangandi mvg) | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |

TAKS

# MVG-ROKNSKAPUR

## Søla

| Dagf. | Faktura nr. | MVG-skyldug søla | | 7<br>MVG-frí søla (útflutningur v.m.) | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|---|
| | | 5<br>☐ írokn. mvg<br>☐ frárokn. mvg | 6<br>Sølu-MVG (útgangandi mvg) | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |